Fríggjadag
við SV- og ÚF-skránni
"ÚR LUFTINI"


# Dimmalætting

NR. 131 • Leygardagur 22. oktober 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212

7 kr.


# Sjómansheim fær stjóra í januar

**Hóast fáar umsóknir eru komnar til starvið sum stjóri á Tórshavnar Sjómansheimi, vónar stýrisformaðurin, at stjórin verður settur fyrst í komandi ári.**

PER HØJGAARD

Tórshavnar Sjómansheim, sum hevur staðið uttan fastan stjóra síðani fyrst í oktober, fær helst nýggjan stjóra fyrst í komandi ári.

Hetta er í øllum førum tað, sum formaðurin í stýrinum fyri heimið, Hans J. Joensen, biskupur, vónar.

- Vit fara at royna, um vit ikki kunnu fáa ein persón ella møguliga eini hjún at taka sær av at stýra sjómansheiminum. Helst skuldi hetta verið komið upp á pláss í januar mánaði, sigur Hans J. Joensen.

### Fáar umsóknir

Fyrrverandi stjórin á sjómansheiminum, Álvur Højgaard, fór úr starvinum 1. oktober, og síðani fyrst í oktober hevur stýrið fyri heimið søkt eftir nýggjum stjóra ella stjórapari.

Hóast nakað av tíð nú er fráliðin, og hóast arbeiðsloysið í landinum ongantíð hevur verið størri enn nú, hava bert fá søkt starvið.

- Stýrið hevur fingið fáar umsóknir. Tær kunnu teljast á einari hond, sigur stýrisformaðurin.

### Trupul uppgáva

Hann heldur tvinnar orsøkir vera til, at so fáar umsóknir eru til starvið.

- Tað er ein torfør uppgáva at arbeiða sum leiðari á sjómansheiminum, tí fíggjarliga støðan er so trupul, sigur Hans J. Joensen.

Hann vísir eisini á, at treytirnar fyri at fáa starvið kunnu hava við sær, at fá søkja.

Ein av treytunum er, at nýggi stjórin skal vera førur fyri at reka heimið á kristnum grundarlag.

### Fáa skil á

Stýrisformaðurin upplýsir, at í løtuni arbeiðir leiðslan á Tórshavnar Sjómansheimi við at fáa skil á teimum fíggjarligu viðurskiftunum á heiminum.

Heimið hevur í fleiri ár verið ríkið við undirskoti, og skuldin er stór. Í ár eru kortini útlit til eitt lítið rakstraravlop.

- Heimið hevði langt síðani verið stongt, um ikki starvsfólkini høvdu gjørt ein sera stóran innsats, sigur Hans J. Joensen.

Orsakað av fíggjarligu umstøðunum er talið á starvsfólkum avmarkað, og skarvað er av lønunum.

Fyribils er tað Jeffrei Johannesen, ið røkir starvið sum stjóri á Tórshavnar Sjómansheimi.



Tórshavnar Sjómansheim — *Mynd: Diml./Jens Kristian*



Ósemja er um, hvør skal vera við í hugskotskappingini um at byggja upp í Studentaskúlan

# Byggifrøðingar og arkitektar ósamdir um arkitektakapping

**Føroya Byggifrøðingafelag er í øðini, tí teir eru útihýstir frá hugskotskappingini um at útbyggja studentaskúlan í Hoydølum. Arkitektafelagið sigur hinvegin, at tað hevur ikki sett sum treyt, at bara teirra limir kunnu luttaka í kappingini.**

MILDRIÐ JACOBSEN

Formaðurin í Arkitektafelag Føroya, Gunnar Hoydal, sigur, at tað er byggiharrin, sum ger av, hvør kann lata uppskot inn til kappingina. Byggiharrar í hesum førinum eru landsstýrið og Føroya Studentaskúli.

Petur Olsen, formaður í Føroya Byggifrøðingafelag, vil vera við, at studentaskúlin hevur ikki sjálvur fingið hugskotið um, at bara limir í Arkitektafelagnum kunnu vera við í kappingini.

Hugskotið er komið frá arkitektunum, sigur Petur Olsen.

### Ráðleggingaruppgáva

Rektarin á studentaskúlanum, Mads Winther, sigur, at talan er um eina ráðleggingaruppgávu.

- Byggifrøðingar og verkfrøðingar sleppa sjálvandi við í øðrum umfari, tá farast skal undir sjálva byggingina, sigur Mads Winther.

Men hetta er Petur Olsen ikki nøgdur við. Hann sigur, at tað einasta, sum teir tá fáa tilluta, eru avmarkað uppgávuøki, sum arkitekturin býtir út.

### Byggifrøðingar mótmæla

Føroya Byggifrøðingafelag hevur sent landsstýrinum mótmæli um at bara limir í Arkitektafelagnum kunnu lata inn uppskot til hugskotskappingina at byggja uppí og umbyggja studentaskúlan í Hoydølum.

Í mótmælinum verður sagt, at seinastu árini hava byggifrøðingar í størri og størri mun verið útihýstir frá at fyrisita og projektera almenn arbeiði.

Heitt verður á landsstýrið um at syrgja fyri, at eitt nú byggifrøðingar kunnu luttaka á jøvnum føti við onnur, tá tað snýr seg um almenna bygging og kappingar.

### Skipast í eina heild

Arkitektarnir, sum lata uppskot inn til kappingina at umbyggja studentaskúlan, skulu ikki gera eina detailætlan.

Men teir skulu lúka krøv um stovur, hvussu verandi bygningar skulu samskipast og hvussu komandi bygging best verður skipað í eina heild, sum hóskar saman við umhvørvinum í Hoydølum.

Virðislønir verða latnar fyri trý tey bestu uppskotini. Seinasta freist at lata inn uppskot er 21. november.

# Gleðið tykkum ikki ov tíðliga til oljuna!

**- Og nýtið alla orku at arbeiða í felag heldur enn í sjálvdrátti, um so er at oljuvinnan kemur, segði Bjørn Vidar Lærøen, kunningarstjóri hjá Statoil í Noreg á kunnandi fundi fyri tíðindafólkum í útvarpshøllini hósdagin**

PÓL Á KLETTI

Bygdir og oyggjar og kommunur liggja nú framvið hvør í sínum lagi at fáa part í eini komandi oljuvinnu.

Men at ein ikki eigur at kanna sær bitan fyrr enn hann er svølgdur vórðu tíðindafólk mint á á kunnandi fundi í útvarpshøllini hósdagin. Statoil í Føroyum hevði fingið umboð higar at kunna tíðindafólk um vinnuna - eina mest við tí fyri eyga at geva fólki sanna og greiða mynd av tí, sum hendir og ikki gikla fólki falskar vónir.

Norðmaðurin Bjørn Vidar Lærøen segði tað vera burturspilt arbeiði, at ymsir partar í landinum í hvør sínum lagi royna at draga til sín ístaðin fyri at savna kreftirnar at møta avbjóðingunum til tess at fáa eitt gott heildarúrslit burturúr.

Hann segði m.a., at oljan í friðartíð kann vera tvíeggjað svørð - bæði til sigurs og tap. Hon kann skjótt byggja upp eitt land, men líka so kjótt bróta niður.

- Føroyingar eiga ikki at gera tað mistaki, sum so mong onnur, ið eru farin í holt við hesa vinnu - at stríðast um hvørt ein oljubasa skal gerast her ella 5 km longur eysturi ella vesturi. Og haraftrat er alt óvist enn um nøkur olja er undir føroyska landgrunsstøðinum, segði Bjørn Vidar Lærøen.



- Heldur enn at stríðast og draga hvør til sín eiga føroyingar at savna kreftirnar at taka ímóti avbjóðingunum, sigur Bjørn Vidar Lærøen, kunningarstjóri hjá Statoil

# 22 vilja leiða Føroyahúsið

**Starvsnevndin fyri Føroyahúsið í Keypmannahavn hevur fingið 22 umsóknir til starvið sum leiðari í húsinum. Nevndin hevur valt sær seks umsøkjarar burturúr og fer nú undir at hava samrøður við hesar umsøkjararnar.**

PER HØJGAARD

Ikki færri enn 22 føroyingar hava bjóðað seg fram til starvið sum leiðari í Føroyahúsinum Keypmannahavn.

Hetta hava teir gjørt við at senda starvsnevndini fyri húsið umsókn um at sleppa at røkja leiðarastarvið.

Starvið sum dagligur leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn varð lýst leyst seinast í september mánaði, og freistin at søkja starvið var úti mikudagin.

### Seks valdir burturúr

Formaðurin í starvsnevndini, Elsa Jóhanna Høgenni, sigur, at nevndin hevði ikki frammanundan væntað sær nakað ávíst tal av umsóknum, men at nevndin nú fer undir at viðgera umsóknirnar nærri.

- Vit hava valt seks væl kvalifiseraðar umsøkjarar burturúr, og í næstum fara vit at hava starvssamrøður við hesar seks, sigur starvsnevndarformaðurin.

Hon sigur, at teir 22 umsøkjararnir eru allir føroyingar, sum annaðhvørt búgva í Føroyum ella í Danmark.

Ætlanin hjá starvsnevndini er at seta nýggja leiðaran í starvið skjótast gjørligt.

Síðani fyrrverandi leiðarin í Føroyahúsinum, Jákup Jacobsen, fór úr starvinum í september, hevur Elin Højgaard røkt starvið fyribils.

## Í BLAÐNUM Í DAG



### Til Florida við Dimmalætting

Sum nakað spildurnýtt fer Dimmalætting undir eina lesarakapping. Kappingin byrjar leygardagin 29. oktober og varir til og við leygardagin 21. januar. Vinningarnir eru ferðir til Florida og Keypmannahavnar. Lesið baksíðuna.

### 10 arbeiðstímar um vikuna

Vaskikona, sum hevur arbeitt t.d. 7 tímar um vikuna, hevur mist rætt til útgjald frá ALS. Hetta verður nú broytt soleiðis, at tað skal løna seg hjá fólki at fáa sær nakrar tímar at vinna til lívsins uppihald uttan at missa ALS-møguleikan.

### Frelsunarherurin 70 ár

Í morgin 23. oktober eru 70 ár síðan Frelsunarherurin byrjaði virksemi sítt og fyrsta møtið var í Havn. Tað vóru offiserar úr Danmark, sum komu higar at stovna Frelsunarherin. Hátíðarhaldið byrjar í kvøld. Gestir eru úr hinum norðurlondum.

### Heystmóti í mynstri

Tey, sum sjálvi duga at seyma, hava góðar dagar. Handlar bjóða nú fram hóskandi tilfar til teirra, sum hava hug at seyma sjálvi og seta dám á heystmótan og harvið hava nakað forkunnugt, sum onnur ikki hava – við uttanáseyming.

### Tíðindi uttaneftir

Morðini av 7 ungum europearum í Australia, ið framd vórðu fyri nøkrum árum síðani, verða nú kannað. Minst 32 fólk lótu lív, tá Songsu brúgvin í Seoul datt niður. Fjúrtan albanar eru deyðir av kolera, og spanskar kvinnur krevja nú líkarætt.



### Skálafjørðurin og Havnin oljusamstarv

Nú frálandavinnan nærkast eru føroyingar yvirhøvur farnir at fyrireika seg til at taka ímóti avbjóðingunum. Formaðurin í Kongshavnar havnastýri bjóðar Skálafjørðin fram til samstarv við Havnina innan oljuvinnuna.


Byrjið eina góða útbúgving nú...

og verðið liðug/ur til jóla!

Undirvíst verður í donskum, skriving, rokning, bókhaldi, handilsrokning, maskinskriving, stenografi, enskum, týskum, fronskum, tekning, søluteknikki, reklamu o.ø.

Sendið lepan inn, og vit senda tygum okkara stóru studie handbók ÓKEYPIS. Ella ringið tlf. 031 86 15 26. Skrivstova skúlans er opin gerandisdagar frá kl. 9-16.

Hr./fr.:

Bústaður:

Postnr.:

Býur.:

DIM

Mønsteds Kursus

Postboks 233 - Jyllandsvej 15

2000 Frederiksberg - København